## At hugsa við hjartanum

Í samrøðum við Annlis Bjarkhamar (myndin) hava 30 avvarðandi hjá sálarsjúkum greitt frá sínum upplivingum í eini støðu, sum triði hvør føroyingur einaferð í lívinum kemur at standa í. Bóklingurin »At hugsa við hjartanum« varð lagdur fram á tíðindafundi í Miðlahúsinum fyri eini viku síðani, og her varð víst á, at hesin bólkurin av fólkum er sera illa fyri.



## Hvar er hjálp at fáa?

Annlis Bjarkhamar hevur sjálv verið avvarðandi hjá einum sálarliga sjúkum, og veit tí rættiliga nógv um støðuna hjá teimum. Í arbeiði sínum við ritgerðini kom tað aftur og aftur til hana, at tey avvarðandi sótu við ótta og í iva, og vóru mangan hjálparleys. Ósvaraði spurningur teirra var, hvar hjálp var at fáa? - Við hesum samrøðunum hava tey ynskt at gera vart við støðuna. Hetta var eisini fyrstu ferð, at nakar var áhugaður í at hoyra júst teirra søgu. - Hesin veruleikin merkti tí eisini samrøðurnar: Tað var rættiliga trupult hjá fleiri teirra at hava fokus á sær sjálvum, tí tey snøgt sagt ikki vóru von við tað, greiðir Annlis Bjarkhamar frá.

# Beiggi er ikki býttur men sálarsjúkur

**- Vit fingu ein nýggjan persón í familjuna, tá sonurin gjørdist sjúkur fyri seks árum síðani. Men vit hava eisini eina sorg, tí vit hava mist bróðurin og sonin, sum vit einaferð høvdu, siga tvey avvarðandi hjá einum sálarsjúkum. Í dag blómar sonurin á sín egna hátt**

SÁLARSJÚKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Henny setti mangan spurnartekin við, hví støðan gjørdist soleiðis, og um hon kundi havt gjørt okkurt øðrvísi í uppvøkstrinum hjá soninum. Hon gavst kortini við hesum, tí tað broytti einki. Tað gjørdi bara gerandisdagin strævnari enn neyðugt*

- Tá sonurin knappliga gjørdist sálarsjúkur frá einum degi til annan, broyttist nógv í familjuni, siga tær báðar Bára og Henny.

Samrøðan við tær báðar er partur av eini ritgerð sum Annlis Bjarkhamar hevur gjørt, har hon hevur tosað við 30 avvarðandi hjá sálarliga sjúkum føroyingum.

Henda familjan er ein av mongum sum hevur merkt til fylgjurnar av, at ein í teirra nærumhvørvi hevur fingið einhvørja sálarliga sjúku.

Hóast hesar sjúkur og hesir sjúklingarnir eru merktir av tabu, tøgn og tutli í krókunum vilja tey fegin siga sína søgu undir dulnevni. Eingin ivi man tó vera um, at mong onnur eru í somu støðu sum tey.

Hetta sama hava tær báðar møðgurnar upplivað. Og í samrøðuni lýsa tær á ein sannførandi hátt umstøðurnar hjá tí sjúka og hjá teimum báðum sum avvarðandi.

- Hóast tað gongur spakuliga framá, hómast ein framgongd. Og vónin um, at sonurin fær eitt innihaldsríkt lív er avgjørt til staðar.

*Tað er ómetaliga trupult at gerast sjúkur í eini sjúkari skipan*

- Hann blómar á sín egna hátt, siga tær báðar í ritgerðini, haðani brot úr samrøðuni eru tikin.

Bæði mamman og systurin hava ikki havt trupulleikar av at vera opin um, at tey hava ein sálarsjúkan son og beiggja.

### Undarlig og nýggj støða

Tað hendi so knappliga, at tilveran í heiminum hjá Henny og familju hennara broyttist grundleggjandi: Sonurin var vorðin sjúkur, og hóast smá tekin vóru til hetta frammanundan, vardi tað ongan at hann hevði eina so álvarsama sálarsjúku.

- Vit vóru ikki fyrireikaðar, og vistu ikki, hvussu illa stóð til, heldur mamman fyri.

Sonurin hevði verið illa fyri frammanundan, og hon hevði roynt at fingið hjálp til hansara, men til fánýtis.

- Tú kanst gerast rættiliga óð, tá ið hugsað verður um hann, sigur Bára. Vit royndu at fáa hjálp til hansara, men har var einki at heinta – ikki fyrrenn beiggin bráðfeingis mátti innleggjast.

Fyri tey avvarðandi var tað ein skelkur at ásanna, hvussu trupult tað var at koma inn í almennu skipanina. Og tá hann so umsíðir kom inn í hesa skipan, var øll familjan at kalla slept upp á fjall.

- Tað vóru vánaligar umstøður. Har var ongin at venda sær til: Hevði bara onkur verið har at rúma hesi undarligu nýggju støðuni í lívinum.

- Ja, hevði bara onkur traðkað til, uttan at tú sjálvur fyrst skuldi taka stig til tað, heldur mamman fyri.

### Følin og sartur

Tá ið sonurin var útskrivaður aftur mátti nógv broytast í gerandisdegnum. Hann búði heima ta fyrstu tíðina, men flutti seinni á stovn.

Í fyrstuni var trupult at seta mørk fyri, hvat hann kundi og ikki, og tey lótu hann stýra rættiliga nógv har heima.

- Hetta var ein trupul tíð, staðfestir Henny.

Samstundis sum hon noyddist at passa arbeiðið sítt og fáa endarnar at røkka saman, mátti hon eisini vísa nógv fyrilit fyri soninum, sum ikki altíð megnaði at rúma øðrum enn sær sjálvum.

Henny setti mangan spurnartekin við, hví støðan gjørdist soleiðis, og um hon kundi havt gjørt okkurt øðrvísi í uppvøkstrinum hjá soninum. Hon gavst kortini við hesum, tí tað broytti einki. Tað gjørdi bara gerandisdagin strævnari enn neyðugt.

- Eg eri nú komin til sættis við, at hann hevur eina sjúku, heldur mamman fyri. – Sjálvandi liva vit í vónini um, at hann fer at megna at fáa eitt gott lív út frá egnum fyritreytum.

Systurin Bára greiðir frá, at tey í byrjanini nýttu nógv tíð at hugsa, um støðan kundi verið øðrvísi um beiggin hevði fingið hjálp beinanvegin, tá ið tey bóðu um hana.

Hinvegin heldur hon, at hann frá barnsbeini hevur verið eitt sindur øðrvísi enn hinir dreingirnir.

- Hann var sera følin og sartur, og hevði eina sera sterka rættvísiskenslu – eina kenslu, sum framvegis liggur djúpt inni í honum.

### Ikki býttur

Hesi seks árini hava Henny og Bára lært ein hóp um, hvussu tað er at liva saman við einum sálarsjúkum persóni – og hvussu umstøðurnar hjá hesum bólkinum av sjúklingum.